# Kinky kallakvøld

**Sexleikur, mótaklæðir, plastikkoperatiónir, romantikkur og meira sex. Kvinnurnar vístu vegin, tá 90 mannfólk fríggjakvøldið skuldu læra kynstrið at verða rættir menn. – Hetta hevði ikki verið, tá vit vóru 18, hildu fleiri, sum vóru til fyrsta mannfólkakvøldið nakrantíð**



*Hóast talan er um eitt veruligt mannfólkakvøld, so er kvinnan rættiliga nógv í fokus*

MANNFÓLK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Uppblásta sexdukkan fer flúgvandi gjøgnum luftina upp um kontrisangaran Hall Joensen, sum er nýkliptur og latin í stramma grøna troyggju og hvítar ítróttarskógvar, eftir at hava fingið eitt sokallað »makeover«.

Dukkan lendir beint á høvdinum á einum av teimum eldru monnunum, av teimum 90, sum sita inni í Mentanarhúsinum Atlantis hetta kvøldið og læra at vera røtt mannfólk.

Maðurin, sum kastaði dukkuna flennir í kíki, tá rakti maðurin hálvnipin vendir sær við at síggja, hvør heldur hann vera so trongjandi.

Uppi á pallinum situr verturin fyri kvøldinum, Gunnar Nolsøe, á eini stórari ljósareyðari vibrerandi keylu.

Verturin kennir seg sera sera sera væl, nú hann verður kitlaður uppundir dintilin

– Hetta kennist bara heilt væl, sigur Gunnar Nolsøe hálvnørdaligt við Elina í Stórustovu, sexolog.

Menninir í salinum eru um at brotna í látri, nú teir hava fingið eitt pirk, og klokkan nærkast 23 á tí fyrsta almenna mannfólkakvøldinum, sum nakrantíð hevur verið í Føroyum.

Hetta er nær endabrestinum á kvøldinum, sum bert er fyri menn og hevur snúð seg um móta, plastikoperatiónir, romantikk og sex. Men nú skrúva vit aftur til byrjanina.

## Myrkursins gleðir

Tað er blivið myrkt, og tað oysir niður í Klaksvík hetta leygarkvøldið. Tað er bítandi kalt, og ein tjúkk rond av mannfólki stendur við hurðina í Atlantis, har teir pumpa sigarettirnar í seg.

Tá komið er inn um rondina í durinum luktar ikki sørt av parfumu. Mannfólka parfumu, brennivíni og sveitta. Menn eru í pussinum. Hava ikki pyntað seg smávegis til eitt ordiligt mannfólkakvøld.

> *Tað plagar at vera konan, sum blakar mær klæðir, men nú fari eg sjálvur at sleppa at keypa klæðir*
> *Hallur Joensen*

Inni í forhøllini standa tvær damur, sum meira enn einaferð hava verið at síggja sum modellir í føroysku bløðunum.

Tær eru lokkandi lítið ílætnar, men beint nú hava menninir størst áhuga fyri brennivínsfløskunum, sum tær hava í hondini.

Akvavitt og bleytari snapsur eru nevniliga at fáa frá damunum. Onki við ljósareyðum blandingum við lítlum parasollum til eitt ordiligt mannfólkakvøld.

Lagið er gott og gerst betri tá onkur fløska er tømd niður í menninar. So lata dyrnar upp innast í forhøllini til lovaða mannfólkalandið.

Tað er rættiliga myrkt inni, og tungur tónleikur spælir rímiliga hart inni í rúminum. Innast er pallurin, har tað íður við stórum feitum stearinljósum í ymiskum litum, sum upplýsa myrka pallin.

Pallurin er í veruleikanum bert er ein sofa og eitt borð, til hetta serliga kvøld, ið klaksvíkingar skipa fyri sum tað fyrsta í Føroyum nakrantíð, eftir at kvinnurnar í fleiri ár hava havt síni kvinnukvøld við ljósareyðum smoothies og øðrum, sum mannfólk ikki hava havt atgongd til.

Nú er tað teirra túrur.

Á einum lørifti koyra eisini myndir av Magnus Arge, klænkaði ursmiðurin, Karl Martin Samuelsen, popidolið, og Hallur Joensen, kontrikongurin.

Inn trínur Gunnar Nolsøe, sum vit best kenna frá spurnarkappingum og arketektursendingum í Kringvarpinum.

– Mínir harrar og mínir harrar, byrjar Gunnar Nolsøe nørdutur og fegin. Hann veit, hvat fer at koma. Og greiðir frá, at skráin byrjar við móta og jólagávuhugskotum til frúurnar og móta til menninar.

## »Jólagávuhugskot«

Tónleikurin fer aftur í gongd.

Inn trína tríggir ungir menn í klæðum, sum stílikonið Hans Fróði Hansen hevði nikkað játtandi til. Í hølunum á mótadreingjunum koma tvær ungar gentur. Jólagávuhugskotini til konurnar fjala ikki nógv av teirra ungu kroppum, og rómur er í salinum millum menninar, sum eru bæði ungir og gamlir.

Nú trína menninir frá løriftinum á pall í heilum holdi. Magnus Arge, Karl Martin Samuelsen, og Hallur Joensen.

Hesir skulu saman við Gunnari Nolsøe sjálvum broytast, so teirra stílur verður meira í tráð við dagsins kvinnudreymar.

– Hvat heldur tú hetta fer